ISBN 978-99918-60-10-7

# Demografisk lýsing av Suðuroy 2007

Dennis Holm

*Granskingardepilin fyri Økismenning*

**ARBEIÐSRIT NR. 15/2007**

*Um arbeiðsrit:*
**Arbeiðsrit eru samfelagsfakliga grundað arbeiði, sum eru minni í vavi og dýpd enn veruligar granskingarverkætlanir. Hesi rit kunnu eitt nú vera umbidnar kanningar, t.v.s. kanningararbeiði, sum Granskingardepilin ger móti gjaldi. Hetta kunnu eisini vera ávegis arbeiði av størri granskingarverkætlanum, undirvisingar- og kunningartilfar ella líknandi. Arbeiðsrit vera altíð skrivað á føroyskum. Hava fólk handrit, sum tey halda eru egnað til útgávu í Arbeiðsriti, eru tey vælkomin at seta seg í samband við depilin (sí adressu á forsíðuni).**

**Demografisk lýsing av Suðuroy 2007**
Dennis Holm 2007
Útgevari: Granskingardepilin fyri Økismenning
Prent: Føroyaprent
**ISBN 978-99918-60-10-7**

**Økislýsing 2006 / 2007**

Arbeiðsritið er partur av verkætlanini Økislýsing 2006 / 2007, sum Granskingardepilin fyri Økismenning fór undir í mai mánað 2006. Higartil eru givnar út hesar útgávur:

Arbeiðsrit 14/2007: Vinnulívið í Suðuroynni 2006, Dennis Holm og Bogi Mortensen
Arbeiðsrit 13/2007: Fólk og vinna í Sandoyar Sýslu 2006, Dennis Holm og Bogi Mortensen
Arbeiðsrit 11/2006: Arbeiðsmegin á føroysku flaka- og fiskavirkjunum í framtíðini, Dennis Holm og Bogi Mortensen
Arbeiðsrit 10/2006: Hækkandi oljuprísir, djúpvatnstrolarar og møguliga avleiðingar fyri Suðuroynna, Bogi Mortensen og Dennis Holm

## Innihaldsyvirlit

1. Inngangur ....7
1.1. Demografisk lýsing av Suðuroy ....7
2. Fólkatalið í Føroyum ....9
2.1. Ymisk gongd í teimum ymsu pørtunum av landinum ....9
2.1.1. Kynsbýtið ....11
3. Fólkatalið í Suðuroy ....13
3.1. Ymisk gongd í kommununum ....13
3.2. Gongdin árini 1985-2007 ....15
3.2.1. Fráflyting í meira enn 20 ár ....16
3.2.2. Manglandi burðaravlop ....18
3.2.3. Føði- og deyðstíttleikin ....20
3.3. Ávirkan á aldurs- og kynssamansetingina ....21
3.3.1. Broytt aldursbýti ....21
3.3.2. Kynsbýtið ....22
3.3.3. Minking í yngru aldursbólkunum ....24
3.3.4. Stór minking í talinum av kvinnum í burðarførum aldri ....25
3.3.5. Lutfalsliga lágur føðitíttleiki ....27
3.3.6. Lutfalsliga høgur deyðstíttleiki ....28
4. Trupulleikin ikki nýggjur! ....30
4.1. Toppaði fólkatalið í Suðuroy í 1921 ....32
5. Skeiv gongd í ein mansaldur ....34
Bókmentir og keldur ....36

## Myndir og talvur

Mynd 1. Fólkatalið í Føroyum 1985-2007. ... 9
Mynd 2. Fólkatalið í Suðuroy 1950-2007. ... 14
Mynd 3. Fólkatalið í Føroyum og í Suðuroy 1985–2007. 1985=Indeks 100. ... 15
Mynd 4. Tilflyting og fráflyting í Suðuroy í tølum, árini 1985-2006. ... 16
Mynd 5. Burðaravlopið pr. 1.000 íbúgvar í Føroyum og í Suðuroy árini 1985-2006. ... 19
Mynd 6. Føði- og deyðstíttleikin í Suðuroy 1985-2006. ... 20
Mynd 7. Aldursbýtið í Suðuroy 1985 og 2007. Býtt í 10 ára aldursbólkar. ... 21
Mynd 8. Aldursbýtið í Føroyum og í Suðuroy, pr. 1. jan. 2007. Býtt í 10 ára aldursbólkar. ... 22
Mynd 9. Aldurs- og kynsbýtið í Suðuroy pr. 1. jan. 2007. Býtt í 10 ára aldursbólkar. ... 23
Mynd 10. Broyting í aldursbólkunum 0-19 ár, í Føroyum og í Suðuroy, árini 1985-2007. ... 24
Mynd 11. Broyting í aldursbólkinum 20-39 ár, í Føroyum og í Suðuroy, árini 1985-2007. ... 25
Mynd 12. Broyting í talinum av kvinnum í aldursbólkinum 15-49 ár, 1985-2007, býtt á sýslur. ... 25
Mynd 13. Tal av kvinnum í Suðuroy í aldursbólkinum 15-49 ár, 1985-2007. ... 26
Mynd 14. Føðitíttleikin í Føroyum og í Suðuroy 1985-2006. Pr. 1.000 íbúgvar. ... 27
Mynd 15. Deyðstíttleikin í Føroyum og í Suðuroy 1985-2006. ... 28
Mynd 16. Fólkatalið í Suðuroy 1801 - 2007. ... 30
Mynd 17. Lutfalsligi parturin av fólkinum í Føroyum, sum búgva í Suðuroy, árini 1801 - 2007. ... 33

Talva 1. Fólkatalið í Føroyum og sýslunum í útvaldum árum 1985-2007. ... 10
Talva 2. Kynsbýtið í Føroyum og sýslunum í útvaldum árum 1985-2007 ... 12
Talva 3. Fólkatalið í kommununum í Suðuroy í útvaldum árum. ... 13
Talva 4. Nettoflyting úr og í Suðuroynna – innanlands og uttanlands, árini 1985 til 2006. ... 17

# 1. Inngangur

Demografi er læran um viðurskifti viðvíkjandi fólkatalinum og hvussu fólkatalið broytist yvir tíð, bæði hvat viðvíkur støðd, aldri og kyni, og hvat viðvíkur broytingum í burðaravlopi (tali av føddum – deyðum) og broytingum í til- og fráflyting.

Fyri Føroyar og teir ymisku partarnar av landinum hevur fólkatalið og kyns- og aldursbýtið stóran týdning. Til dømis kann eitt lágt fólkatal hava ávirkan á trivnaðin í einum øki. Meðan eitt skjótt vaksandi fólkatal kann seta eyka trýst á eitt øki, t.d. til krøv um útstykkingar (eins og vit hava sæð í eitt nú Tórshavnar kommunu). Eitt stórt tal av eldri fólki førir við sær øktan tørv á eldraøkinum. Meðan eitt stórt tal av børnum og ungum hinvegin kann hava ávirkan á tørvin á tilboðum innan barnaansing, fólkaskúla og ítróttar- og frítíðartilboðum. Ein skeiv samanseting hvat aldri viðvíkur, við t.d. einum lutfalsliga lítlum tali av fólki í arbeiðsførum aldri, kann hava ávirkan á møguleikarnar hjá vinnulívinum at menna seg. Á hendan hátt hevur fólkatalið stóran týdning bæði fyri tann sosiala partin, tann kommunala og landsbúskaparliga partin og fyri tann vinnuliga partin í landinum sum heild og í teimum ymisku pørtunum í landinum.

Útbyggingar av føroyska vegakervinum, sum hava ført (og framvegis fara at føra) við sær, at alsamt fleiri fólk (í dag 85%) "kunnu koyra í túnið hvør hjá øðrum", ávirka í hvønn mun nevndu viðurskifti eru galdandi fyri teir ymisku partarnar av landinum. Til dømis er støðan í Vágum í dag, við vegasambandi til miðstaðarøkið, Eysturoynna og Klaksvík, ikki tann sama sum fyri bara 10 árum síðani. Meðan støðan í Suðuroy er at kalla hin sama í dag sum fyri 10 árum síðani, hóast nýggj ferja er farin at sigla millum Suðuroynna og Havnina.

## 1.1. Demografisk lýsing av Suðuroy

Hetta arbeiðsritið er ein demografisk lýsing av Suðuroy. Við ársbyrjan 2007 búðu 4.940 fólk í Suðuroy. Hetta eru út við 1.000 fólk færri enn fyrst í 1990unum. Ein so stór minking í fólkatalinum hevur í flestu førum víðfevnda demografiska ávirkan, men hvussu hevur ávirkanin meira nágreiniliga verið í Suðuroy? Hvussu hava broytingarnar í til- og fráflytingini verið? Hvussu er burðaravlopið broytt sum fylgja av einum minkandi fólkatali? Er aldurs- og kynssamansetingin broytt, og hvussu stórar eru broytingarnar, tá samanborið verður við gongdina í landinum sum heild? Hvussu er føði– og deyðstíttleikin ávirkaður av minkandi

fólkatalinum? Hesir spurningar, eins og spurningar viðvíkjandi orsøkunum til broytingarnar í fólkatalinum í Suðuroy, verða viðgjørdir í ritinum.

Lýsingin av gongdini í fólkatalinum og fólkatalssamansetingini í Suðuroy er grundað á hagtøl frá Hagstovu Føroya og frá Landsfólkayvirlitinum.

# 2. Fólkatalið í Føroyum

Fólkatalið í Føroyum vaks støðugt øll 1980árini. Men tá búskaparkreppan rakti landið fyrst í 1990árunum, minkaði fólkatalið nógv, einamest orsakað av stórari fráflyting. Hendan gongdin helt áfram í fyrru helvt av 1990árunum. Í 1996/1997 vendi gongdin, og fólkatalið vaks nógv í árunum frá 1996 og fram til 2004. Eftir hetta hevur fólkatalið ligið um 48.300-48.400 fólk. Við ársbyrjan 2007 búðu 48.350 fólk í Føroyum.




**Mynd 1. Fólkatalið í Føroyum 1985-2007.**
*Kelda: Hagstova Føroya*

Hóast fólkatalið hevur ligið nøkulunda støðugt tey seinastu árini, so er talan um ein stóran vøkstur í mun til fólkatalið miðskeiðis í 1990árunum – frá 1995 til 2007 er fólkatalið vaksið við 11,7%. Í mun til 1990 – t.v.s. áðrenn búskaparkreppan av álvara fór at merkjast kring landið – er fólkatalið í 2007 tó áleið tað sama, talan er um ein vøkstur uppá 1,3%.

## 2.1. Ymisk gongd í teimum ymsu pørtunum av landinum

Gongdin í fólkatalinum tey seinastu gott og væl 20 árini er ættiliga ymisk frá einum parti av landinum til annan. Tað er serliga í miðstaðarøkinum og í teimum økjunum, sum eru partur av miðstaðarøkinum – t.v.s. sum hava vegasamband við miðstaðarøkið – at vøkstur hevur verið.

| **Fólkatalið í Føroyum og sýslunum** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **1985** | **1990** | **1995** | **2000** | **2005** | **2007** |
| Norðoya Sýsla | 5.907 | 6.148 | 5.724 | 5.810 | 5.995 | 5.980 |
| Eysturoyar Sýsla | 9.974 | 10.533 | 9.502 | 9.995 | 10.736 | 10.810 |
| Streymoyar Sýsla | 18.852 | 20.549 | 19.037 | 20.531 | 22.202 | 22.188 |
| Vága Sýsla | 2.931 | 2.947 | 2.645 | 2.614 | 2.910 | 2.968 |
| Sandoyar Sýsla | 1.772 | 1.757 | 1.541 | 1.445 | 1.467 | 1.464 |
| Suðuroyar Sýsla | 5.882 | 5.836 | 5.195 | 4.958 | 5.036 | 4.940 |
| **Føroyar** | **45.318** | **47.770** | **43.644** | **45.353** | **48.346** | **48.350** |

| **Prosent av fólkinum, býtt á sýslur** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **1985** | **1990** | **1995** | **2000** | **2005** | **2007** |
| Norðoya Sýsla | 13,0% | 12,9% | 13,1% | 12,8% | 12,4% | 12,4% |
| Eysturoyar Sýsla | 22,0% | 22,0% | 21,8% | 22,0% | 22,2% | 22,4% |
| Streymoyar Sýsla | 41,6% | 43,0% | 43,6% | 45,3% | 45,9% | 45,9% |
| Vága Sýsla | 6,5% | 6,2% | 6,1% | 5,8% | 6,0% | 6,1% |
| Sandoyar Sýsla | 3,9% | 3,7% | 3,5% | 3,2% | 3,0% | 3,0% |
| Suðuroyar Sýsla | 13,0% | 12,2% | 11,9% | 10,9% | 10,4% | 10,2% |
| **Føroyar** | **100,0%** | **100,0%** | **100,0%** | **100,0%** | **100,0%** | **100,0%** |

| **Indeks yvir gongdina í fólkatalinum, 1985 = Indeks 100** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **1985** | **1990** | **1995** | **2000** | **2005** | **2007** |
| Norðoya Sýsla | 100,0 | 104,1 | 96,9 | 98,4 | 101,5 | 101,2 |
| Eysturoyar Sýsla | 100,0 | 105,6 | 95,3 | 100,2 | 107,6 | 108,4 |
| Streymoyar Sýsla | 100,0 | 109,0 | 101,0 | 108,9 | 117,8 | 117,7 |
| Vága Sýsla | 100,0 | 100,5 | 90,2 | 89,2 | 99,3 | 101,3 |
| Sandoyar Sýsla | 100,0 | 99,2 | 87,0 | 81,5 | 82,8 | 82,6 |
| Suðuroyar Sýsla | 100,0 | 99,2 | 88,3 | 84,3 | 85,6 | 84,0 |
| **Føroyar** | 100,0 | 105,4 | 96,3 | 100,1 | 106,7 | 106,7 |

**Talva 1. Fólkatalið í Føroyum og sýslunum í útvaldum árum 1985-2007.**
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Um støði verður tikið í árinum 1985 (sí indeks í talvu 1 omanfyri), so er talan um ein vøkstur í fólkatalinum í Føroyum á 6,7% - frá 45.318 fólkum í 1985 til 48.350 fólk við ársbyrjan í 2007. Býtt á sýslur, so er tað serliga í Streymoyar sýslu, at fólkatalið er vaksið nógv (17,7%). Umframt Streymoyar sýslu, so er fólkatalið eisini vaksið í Eysturoyar sýslu, har fólkatalið er

vaksið við 8,4% í nevnda tíðarskeiði. Í mun til fólkatalið í 1985, so hevur fólkavøksturin í Norðoya- og Vága sýslum verið lítil í árunum fram til 2007. Og fólkatalið í Suðuroyar- og Sandoyar sýslum er minkað heilt nógv, við 17,4% í Sandoyar sýslu og 16,0% í Suðuroyar sýslu.

Gongdin í fólkatalinum í Føroyum árini 1985 til 2007 hevur tó sum nevnt verið rættiliga skiftandi, við vøkstri fyrst í tíðarskeiðinum, stórari minking mitt í tíðarskeiðinum, og so aftur einum vøkstri, sum seinastu árini er vorðin lítil (fólkatalið stendur nærum í stað). Býtt á sýslur, so er gongdin aftur her rættiliga ymisk. Til dømis er fólkatalið í Streymoyar sýslu í kreppuárunum í fyrru helvt av 1990árunum ongantíð lægri enn fólkatalið mitt í 1980árunum – hetta er hinvegin galdandi fyri øll hini økini í landinum. Eitt annað er, at allar sýslur – uttan Suðuroyar- og Sandoyar sýslur – hava havt somikið stóra framgongd í fólkatalinum tey seinastu 10 árini, at fólkatalið við ársbyrjan 2007 var hægri enn fólkatalið í 1985. Við øðrum orðum er skeiva gongdin í fólkatalinum, sum byrjaði fyrst í 1990árunum vend í øllum økjum í landinum, uttan í Suðuroyar- og Sandoyar sýslum.

### 2.1.1. Kynsbýtið

Við ársbyrjan 2007 vóru tað 23.215 kvinnur og 25.135 menn í Føroyum, svarandi til eitt kynsbýti á 48,0% kvinnur og 52,0% menn. Við øðrum orðum er eitt undirskot á umleið 2.000 kvinnur í Føroyum. Hendan støðan er øðrvísi enn í øðrum Vesturevropeiskum londum, har tað í flestu londunum eru fleiri kvinnur enn menn. Hinvegin er kynsbýtið í Føroyum sambæriligt við kynsbýtið í øðrum útjaðaraøkjum eitt nú í Norðurlondum.

Eins og við gongdini í fólkatalinum, so er tað rættiliga ymiskt, hvussu kynsbýtið er í teimum ymisku pørtunum av landinum – sí eisini talvu 2 niðanfyri. Í Streymoyar sýslu er býtið "javnast", har eru 49,1% av fólkinum kvinnur og 50,9 eru menn. "Skeivasta" býtið er í Sandoyar sýslu, har 45,9% eru kvinnur og 54,1% eru menn.

**Kynsbýtið í Føroyum**

**Kvinnur**

| | 1985 | 1990 | 1995 | 2000 | 2005 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðoya Sýsla | 47,1% | 47,1% | 47,3% | 47,5% | 47,3% | 47,7% |
| Eysturoyar Sýsla | 46,6% | 46,7% | 47,5% | 47,4% | 47,1% | 46,9% |
| Streymoyar Sýsla | 48,6% | 48,8% | 49,3% | 49,3% | 49,1% | 49,1% |
| Vága Sýsla | 47,0% | 46,8% | 47,1% | 47,6% | 47,3% | 47,5% |
| Sandoyar Sýsla | 47,7% | 46,8% | 45,9% | 46,0% | 45,6% | 45,9% |
| Suðuroyar Sýsla | 48,3% | 48,0% | 48,3% | 47,7% | 47,3% | 46,9% |
| **Føroyar** | **47,8%** | **47,8%** | **48,3%** | **48,3%** | **48,0%** | **48,0%** |

**Menn**

| | 1985 | 1990 | 1995 | 2000 | 2005 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðoya Sýsla | 52,9% | 52,9% | 52,7% | 52,5% | 52,7% | 52,3% |
| Eysturoyar Sýsla | 53,4% | 53,3% | 52,5% | 52,6% | 52,9% | 53,1% |
| Streymoyar Sýsla | 51,4% | 51,2% | 50,7% | 50,7% | 50,9% | 50,9% |
| Vága Sýsla | 53,0% | 53,2% | 52,9% | 52,4% | 52,7% | 52,5% |
| Sandoyar Sýsla | 52,3% | 53,2% | 54,1% | 54,0% | 54,4% | 54,1% |
| Suðuroyar Sýsla | 51,7% | 52,0% | 51,7% | 52,3% | 52,7% | 53,1% |
| **Føroyar** | **52,2%** | **52,2%** | **51,7%** | **51,7%** | **52,0%** | **52,0%** |

**Talva 2. Kynsbýtið í Føroyum og sýslunum í útvaldum árum 1985-2007.**
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Í Suðuroyar sýslu er býtið av kvinnum og monnum vorðið alsamt skeivari síðan mitt í 1990árunum, við einum vaksandi tali av monnum og alsamt færri kvinnum.

# 3. Fólkatalið í Suðuroy

Seinastu áratíggjuni er fólkatalið í Suðuroy støðugt minkað. Í 1950 búðu 6.268 fólk í Suðuroy, og hetta er tað mesta, fólkatalið í Suðuroy hevur verið. Tey fyrstu árini av 1950árunum lá fólkatalið á sama støði sum í 1950, men miðskeiðis í 1950árunum byrjaði fólkatalið at minka, og hendan minking helt á fram til 1970, tá fólkatalið var komið niður á 5.555. Í 1970árunum og fram til 1980 vaks fólkatalið nakað aftur (í 1980 búðu 5.913 fólk í Suðuroy), men gongdin síðan hetta hevur verið rættiliga einsíðugt negativ við undantaki av einstøkum árum beint eftir ár 2000. Við ársbyrjan 2007 búðu 4.940 fólk í Suðuroy.

Fólkatalið við ársbyrjan í 2007 er umleið tað sama sum í fyrru helvt av 1920árunum. Í 1922 búðu 4.933 fólk í Suðuroy, tá var fólkatalið í Føroyum 21.352, sostatt búðu 22,7% av føroyingunum í Suðuroy. Við ársbyrjan 2007 búðu 10,2% av føroyingunum í Suðuroy.

## 3.1. Ymisk gongd í kommununum

Býtt á kommunurnar í Suðuroy hevur gongdin í fólkatalinum verið ymisk tey seinastu 100 árini, sí eisini talvu 3 niðanfyri.

| | 1900 | 1925 | 1950 | 1975 | 2007 | %-vís broyting 1900-1950 | %-vís broyting 1950-2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Hvalbiar | 602 | 804 | 822 | 813 | 765 | 36,5% | -6,9% |
| Tvøroyrar | 907 | 1.786 | 2.106 | 2.016 | 1819 | 132,2% | -13,6% |
| Fámjins | 129 | 203 | 228 | 181 | 113 | 76,7% | -50,4% |
| Hovs* | | 182 | 192 | 142 | 125 | | -34,9% |
| Porkeris* | 467 | 492 | 461 | 325 | 333 | | -27,8% |
| Vágs** | 499 | 1.125 | 1.786 | 1.641 | 1402 | 257,9% | -21,5% |
| Sumbiar | 424 | 549 | 673 | 567 | 383 | 58,7% | -43,1% |
| **Suðuroy** | **3.027** | **5.141** | **6.268** | **5.685** | **4.940** | **107,1%** | **-21,2%** |
| **Føroyum** | **15.023** | **22.835** | **31.781** | **42.615** | **48.350** | **111,5%** | **52,1%** |
| **Suðuroy lutfalsliga av Føroyum** | **20,2%** | **22,5%** | **19,7%** | **13,3%** | **10,2%** | | |

**Talva 3. Fólkatalið í kommununum í Suðuroy í útvaldum árum.**
*Kelda: Landsfólkayvirlitið og Hagstova Føroya*

** Hovs kommuna sjálvstøðug kommuna í 1921, undan tí partur av Porkeris kommunu.*

*** Nes gerst partur av Vágs kommunu í 1928, undan tí partur av Porkeris kommunu.*

Fólkatalið í Suðuroy var hægst í 1950, tá 6.268 fólk búðu í Suðuroy. Og um skilt verður millum tíðarskeiðið fyri 1950 og tíðarskeiðið eftir 1950, so er myndin rættiliga greið. Um árini frá 1900 til 1950 verða tikin undir einum, so er vøksturin í fólkatalinum í Suðuroy sambæriligur við vøksturin í fólkatalinum í Føroyum. Fólkatalið í Føroyum vaks við 111,5% hesi árini, og vøksturin í Suðuroy var á 107,1%. Tað eru serliga tey stóru plássini í Suðuroy, Vágs- og Tvøroyrar kommunur, sum bera vøksturin, meðan vøksturin í teimum smærri kommunum í oynni er nakað lægri.

Í tíðarskeiðinum frá 1950 til 2007 er fólkatalið í Suðuroy hinvegin minkað við 21,2%, meðan fólkatalið í Føroyum í sama tíðarskeiði er vaksið við 52,1%. Talan hevur sum heild verið um eina støðuga niðurgongd, við undantaki av einum tíðarskeiði í 1970árunum og einstøk ár fyrst í hesari øldini. Vert er eisini at leggja til merkis, at í "teimum góðu 1980árunum", har fólkatalið í Føroyum vaks við umleið 6,9%, minkaði fólkatalið í Suðuroy við 1,3%.




**Mynd 2. Fólkatalið í Suðuroy 1950-2007.**
*Keldur: Landsfólkayvirlitið og Hagstova Føroya*

Tá hugt verður eftir gongdini í teimum ymisku kommununum, so er talan um eina fjølbroytta gongd. Tann minsta kommunan, Fámjins kommuna, hevur merkt størstu afturgongdina, og fólkatalið er minkað við einari helvt síðan 1950. Eisini í Hovs og Porkeris kommunum er fólkatalið minkað nógv. Áhugavert er, at fólkatalið í Sumbiar kommunum, sum í 1950 var

nærum 700 fólk, er minkað við næstan 45% í árunum frá 1950 til 2007. Í nógv áratíggju hava Tvøroyrar og Vágs kommunur verið miðdeplarnir í oynni, og minkingin í fólkatalinum í hesum báðum kommunum er ikki eins stór og miðal minking fyri alla oynna.

At enda er tað eisini áhugavert, at Hvalbiar kommuna er tann, sum hevur klárað seg "best", hvat viðvíkur gongdini í fólkatalinum í kommununum í oynni. Minkingin í fólkatalinum í Hvalbiar kommunu er "bert" 6,2% í árunum frá 1950 til 2007. Ein orsøk er helst, at Hvalba í vinnuligum høpi tey seinastu áratíggjuni hevur staðið seg framúr væl[1].

## 3.2. Gongdin árini 1985-2007

Í tíðarskeiðinum frá 1985 til 2007 er fólkatalið í Suðuroy minkað við 942 fólkum, svarandi til eina minking á 16,0%. Sum víst í mynd 3 niðanfyri, er fólkatalið í Føroyum í sama tíðarskeiði vaksið við 6,7%.




**Mynd 3. Fólkatalið í Føroyum og í Suðuroy 1985–2007. 1985=Indeks 100.**
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Orsøkirnar til skeivu gongdina í fólkatalinum í Suðuroy eru fráflyting og lágt ella manglandi burðaravlop.

[1] Lesið meiri um hetta í "Vinnulívið í Suðuroynni í 2006", sum er arbeiðsrit, sum Dennis Holm og Bogi Mortensen hava skrivað, og Granskingardepilin fyri Økismenning hevur givið út.

### 3.2.1. Fráflyting í meira enn 20 ár

Í tíðarskeiðinum frá 1985 til 2006 hevur stór fráflyting verið úr Suðuroy. Tilsamans eru nettofráflytingin í hesum tíðarskeiði 1.020 fólk (Hagstova Føroya). Øll árini frá 1985 til 2006 hevur verið talan um eina fráflyting – undantikin eru tó árini 1988, 2000-2002, sí eisini talvu niðanfyri.




**Mynd 4. Tilflyting og fráflyting í Suðuroy í tølum, árini 1985-2006.**
*Kelda: Hagstova Føroya*

Tá til- og fráflytingin verður gjørd upp, verður skilt millum flytingar innanlands og flytingar uttanlands. Í Suðuroy hevur tað tey flestu árini frá 1985 til 2006 verið talan um eina netto-fráflyting, bæði innanlands (t.v.s. millum Suðuroynna og onnur øki í landinum) og uttanlands (t.v.s. millum Suðuroynna og útlandið), tó at undantøk eru – sí eisini talvu 4 niðanfyri. Sæð undir einum er tann stóra fráflytingin úr Suðuroy út í heim. Í árunum 1985 til 2006 er ein nettofráflyting út í heim á 702 fólk, meðan nettofráflytingin innanlands er 318 fólk.

Stóra fráflytingin úr Suðuroy var í fyrru helvt av 1990árunum, tá fleiri enn 800 fólk fluttu úr Suðuroy. Eftir hetta minkaði streymurin av fólki úr Suðuroy nakað – og um aldaskiftið broyttist fráflytingin til tilflyting einstøk ár. Men síðan hetta er streymurin aftur broyttur til fráflyting. Í mun til undanfarin ár, var í 2006 ein lítil fráflyting úr Suðuroy.

| | Nettoflyting innanlands | Nettoflyting uttanlands | Nettoflyting tilsamans |
|---|---|---|---|
| **1985** | -15 | -45 | -60 |
| **1986** | -30 | 21 | -9 |
| **1987** | -36 | 1 | -35 |
| **1988** | -11 | 16 | 5 |
| **1989** | -2 | -25 | -27 |
| **1990** | 16 | -89 | -73 |
| **1991** | -3 | -43 | -46 |
| **1992** | -30 | -128 | -158 |
| **1993** | -14 | -170 | -184 |
| **1994** | -23 | -230 | -253 |
| **1995** | -11 | -103 | -114 |
| **1996** | -3 | -28 | -31 |
| **1997** | -21 | -6 | -27 |
| **1998** | -38 | 25 | -13 |
| **1999** | -17 | 9 | -8 |
| **2000** | -9 | 17 | 8 |
| **2001** | 36 | 87 | 123 |
| **2002** | -10 | 76 | 66 |
| **2003** | -70 | 14 | -56 |
| **2004** | -2 | -43 | -45 |
| **2005** | -31 | -43 | -74 |
| **2006** | 6 | -15 | -6 |
| **Tils.** | **-318** | **-702** | **-1.020** |

**Talva 4. Nettoflyting úr og í Suðuroynna – innanlands og uttanlands, árini 1985 til 2006.**
*Kelda: Hagstova Føroya.*

**"Ein familja" flutt um mánaðin í fleiri enn 20 ár**

Tilsamans eru 1.020 fólk flutt úr Suðuroy í árunum 1985 til 2006. Umroknað til mánaðir, er talan um umleið 4 fólk í miðal um mánaðin, svarandi til at "ein familja" er flutt úr Suðuroy hvønn mánað í fleiri enn 20 ár.

**Hví flyta fólk?**

Tað eru fleiri orsøkir til, at fólk flyta úr einum øki í annað øki í landinum ella uttanlands. Orsøkirnar eru eisini ymiskar frá einum øki til annað. Ein tann mest vanliga orsøkin er, at ung fólk flyta fyri at fáa sær eina útbúgving. Í dag er tað vorðið vanligt, at ung fáa sær miðnámsútbúgving og eftir hetta hægri útbúgving. Fyri Suðuroynna merkir tað, at eftir

miðnámsútbúgving noyðast tey flestu at flyta[2], um ikki annað so í eitt avmarkað tíðarskeið. Ein onnur orsøk til, at fólk flyta, er eftir arbeiði. Talan kann vera um, at fólk flyta fyri at fáa eitt betri arbeiði ella eftir einum arbeiði, sum tey hava áhuga fyri, ella fyri yvirhøvur at fáa eitt arbeiði. Í triðja lagi, so eru tað eisini nøkur, sum velja at flyta til størri pláss, burtur frá teimum smáu bygdunum við tí avmarkaða bygdarlívinum. Í hesum sambandi hava sjónvarp og internet í nýggjari tíð havt stóra ávirkan, m.a. við at hesir miðlar eisini varpa ljós á, hvussu tann modernaði lívsstílurin í stórbýnum er. Hetta ávirkar eisini valini, sum ung í Føroyum gera á teirri lívsleið.

Ein samanrenning av nevndu orsøkum, hevur ført við sær, at ein ávís fráflyting hevur verið úr Suðuroy, úr Sandoy og av útoyggj tey seinastu nógvu árini. Í Suðuroy hevði búskaparkreppan fyrst í 1990árunum eisini stóra ávirkan, tá stórt arbeiðsloysi førdi við sær stóra fráflyting. Í fleiri áratíggjur hevur tað sostatt verið ein stór avbjóðing – og er tað framvegis í dag ein tann størsta avbjóðingin í Suðuroynni at fáa fólk at flyta aftur í oynna.

### 3.2.2. Manglandi burðaravlop

Ein onnur orsøk til skeivu gongdina í fólkatalinum í Suðuroy er "manglandi" burðaravlop (fødd – deyð = burðaravlop). Um árini 1990 til 2006 verða tikin undir einum, so hevur burðaravlopið í Suðuroy í hesum tíðarskeiðinum verið 5. Til samanberingar kann nevnast, at í Norðoya sýslu (har tað búgva umleið 6.000 fólk, t.v.s. umleið 1.000 fólk fleiri enn í Suðuroy) var burðaravlopið í sama tíðarskeiði 646, ella 130 ferðir so stórt sum í Suðuroy.

Um hugt verður at einum longri tíðarskeiði, at árunum 1985 til 2006, so er í hesum tíðarskeiði eitt samlað burðaravlop í Suðuroy uppá 85. Hóast talan er um eitt burðaravlop í hesum tíðarskeiðinum, so er avlopið tó sera lítið, tá samanborið verður við restina av landinum.

---

[2] Tað ber til at nema sær útbúgving sum heilsu-atstøðingur á Heilsuskúlanum á Tvøroyri.




**Mynd 5. Burðaravlopið pr. 1.000 íbúgvar í Føroyum og í Suðuroy árini 1985-2006.**
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Tá burðaravlopið í Suðuroy verður samanborið við burðaravlopið í Føroyum – í myndini omanfyri umroknað til burðaravlop pr. 1.000 íbúgvar[3] – so fæst eisini ein greið mynd av, at burðaravlopið í Suðuroy er væl lægri enn í landinum sum heild. Í árunum frá 1985 og fram til og við 1991 var burðaravlopið í Suðuroy positivt, tó undantikið árið 1988. Eftir hetta hevur burðaravlopið verið lágt / negativt øll 1990árini. Gongdin hevur eisini verið rættiliga ivasom tey seinastu 3-4 árini. Onki ár í øllum tíðarskeiðinum frá 1985 til árslok 2006 hevur burðaravlopið í Suðuroy verið í nær námind av burðaravlopinum í Føroyum.

Burðaravlopið í Føroyum hevur øll árini frá 1985 til 2006 verið positivt. Burðaravlopið tey seinastu 10 árini er tó sum heild lægri enn burðaravlopið í seinnu helvt av 1980árunum. Um burðaravlopið í Suðuroy var eins stórt og miðal burðaravlopið í Føroyum í árunum 1985 til 2006, so hevði árliga burðaravlopið í Suðuroy verið umleið 40 ella meiri enn 900 tilsamans í nevnda tíðarskeiði (burðaravlopið hesi árini var tilsamans 85).

[3] Skal lesast soleiðis: Í 2006 blivu tað født 5,1 børn fyri hvørjar 1.000 íbúgvar í Føroyum.

**Glotti í 2006?**

Í 2006 var burðaravlopið positivt við 6. Høvuðsorsøkin er, at tað vórðu fødd nógv børn í Suðuroy í 2006, tá tilsamans 73 børn vórðu født í Suðuroy, og hetta er tað mesta í fleiri enn 10 ár (síðan 1994, tá 77 børn vórðu født). Samanborið við undanfarin ár, er talan um eitt óvanligt ár, spurningurin er so, um kvinnur í Suðuroy eisini í komandi tíðum fara at fáa fleiri børn enn áður? Leggjast kann afturat, at burðaravlopið í Suðuroy 1. ársfjórðing í 2007 var negativt við 5 (Hagstova Føroya).

### 3.2.3. Føði- og deyðstíttleikin

Um hugt verður at føði- og deyðstíttleikanum í Suðuroy árini 1985 til 2006, so er føðitíttleikin størri enn deyðstíttleikin árini fram til 1992, t.v.s. at tað í hesum árum er talan um eitt burðaravlop. Í nøkur ár eftir hetta var føði- og deyðstíttleikin áleið eins stórur, meðan deyðstíttleikin í nøkur ár hevur verið størri enn føðitíttleikin.




**Mynd 6. Føði- og deyðstíttleikin í Suðuroy 1985-2006.**
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Mynd 6 omanfyri vísir sostatt greitt ein av demografisku trupulleikunum, sum eru í Suðuroy: Tað verða født ov fá børn í mun til talið av fólki, sum doyr. Hetta ger, at natúrligi fólkavøksturin (t.v.s. burðaravlopið) er lágur, og hevur eisini í fleiri ár verið negativur.

## 3.3. Ávirkan á alders- og kynssamansetingina

Ein stór minking í fólkatalinum orsakað av fráflyting og manglandi burðaravlopi hevur sjálvsagt stóra ávirkan á alders- og kynssamansetingina. Hetta hevur eisini verið galdandi fyri Suðuroynna, har lutfalsligi parturin av yngri fólki er broyttur munandi seinastu árini, umframt at ein greið ávirkan eisini er á kynsbýtið í oynni.

### 3.3.1. Broytt aldursbýti

Undir einum hevur fráflytingin og manglandi burðaravlopið í Suðuroy ført við sær eina minking í teimum yngru aldursbólkunum og ein vøkstur í teimum eldru aldursbólkunum. Teir yngru aldursbólkarnir eru minkaðir bæði orsakað av, at færri børn verða fødd og orsakað av, at tey, sum eru flutt, í stóran mun eru familjur við børnum og ung fólk.




**Mynd 7. Aldursbýtið í Suðuroy 1985 og 2007. Býtt í 10 ára aldursbólkar.**
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Allir teir yngru aldursbólkarnir – t.v.s. aldursbólkarnir 40 ár og yngri – eru minkaðir í tíðarskeiðinum frá 1985 til 2006, meðan teir eldru aldursbólkarnir sum heild eru blivnir størri, hetta er serliga galdandi fyri aldursbólkarnar frá 40-59 ár. Ein av orsøkunum til hesa gongd er, at fólkatalið sum heild er minkað í Suðuroy, men minkingin hevur tó verið størst í teimum

yngru aldursbólkunum. Eisini tá samanborið verður við aldursbýtið í Føroyum, er aldursbýtið í Suðuroy merkt av stórum eldri árgangum og smáum yngri árgangum.




**Mynd 8. Aldursbýtið í Føroyum og í Suðuroy, pr. 1. jan. 2007. Býtt í 10 ára aldursbólkar.**
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Tann yngsti aldursbólkurin – bólkurin 0-9 ár – er væl minni í Suðuroy enn í landinum sum heild. Hartil eru allir aldursbólkarnir frá 10 ár til og við 49 ár eisini minni í Suðuroy, tó at munurin ikki er eins stórur og í teimum yngstu aldursbólkunum. Allir aldursbólkarnir frá 50 ár til 89 ár eru væl størri í Suðuroy enn teir eru í Føroyum sum heild.

## 3.3.2. Kynsbýtið

Við ársbyrjan 2007 vóru 52% av føroyingum menn, meðan 48% vóru kvinnur (Hagstova Føroya). Í Suðuroy var býtið heldur “skeivari” enn í landinum sum heild, 53,1% vóru menn, meðan 46,9% vóru kvinnur. Í 1985 var kynsbýtið í Suðuroy: 51,7 % menn og 48,3% kvinnur.




**Mynd 9. Aldurs- og kynsbýtið í Suðuroy pr. 1. jan. 2007. Býtt í 10 ára aldursbólkar.**
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Tá hugt verður eftir aldurs- og kynsbýtinum í Suðuroy, so eru fleiri "skeivleikar" í samansetingini. Mest sjónligt er, at tað í aldursbólkinum 20-29 ár og 30-39 ár er eitt munandi undirskot av kvinnum, meðan tað í aldursbólkinum 0-9 ár og 10-19 ár eru fleiri kvinnur enn menn. Í Føroyum sum heild eru aldursbólkarnir av kvinnum og monnum í bólkunum 0-9 ár og 10-19 ár javnstórir. Hinvegin eru tað í Føroyum sum heild fleiri menn enn kvinnur í aldursbólkinum 20-29 ár, hóast munurin ikki er eins stórur og í Suðuroy – somu viðurskifti eru eisini galdandi fyri aldursbólkin 30-39 ár.

Leggjast kann afturat, at av teimum størru plássunum í Suðuroy er tað serliga í Hvalbiar kommunu, at tað er eitt stórt undirskot av kvinnum. Við ársbyrjan 2007 var kynsbýtið í Hvalbiar kommunu: 55,4% menn og 44,6% kvinnur. – Og tað er serliga í aldursbólkunum 10-19 ár og 20-29 ár, at tað eru væl færri kvinnur enn menn. Í aldursbólkinum 20-29 ár eru tað tvær ferðir so nógvir menn sum kvinnur í Hvalbiar kommunu. Tað eru uttan iva fleiri orsøkir til skeivleikan í kynsbýtinum í Hvalbiar kommunu. Ein orsøk er, at tað sum heild eru flutt fleiri konufólk úr Suðuroy enn mannfólk. Ein onnur orsøk er møguliga eisini, at tað í

tíðarskeiðinum 1985 til 2006 eru fødd væl fleiri dreingjabørn enn gentubørn í Hvalbiar kommunu – 58,5% dreingjabørn og 41,5% gentubørn, sama býtið í Suðuroy er 51,7% dreingjabørn og 48,3% gentubørn (Hagstova Føroya).

### 3.3.3. Minking í yngru aldursbólkunum

Tað at talið av ungum fólki í Suðuroy er minkað heilt nógv í fleiri áratíggju førir við sær stórar avbjóðingar. Fólkatalið í Suðuroy er sum nevnt minkað við 16,0% í tíðarskeiðinum frá 1985 til 2007. Í sama tíðarskeiði er aldursbólkurin av teimum, sum eru yngri enn 20 ár minkaður við 31,5%, býtt á kyn er minkingin størri hjá kvinnunum (32,7%) enn monnunum (30,3%). Samanborið við gongdina í landinum sum heild er talan um eina munandi størri minking í Suðuroy enn í Føroyum sum heild, sí eisini mynd 10 niðanfyri.




**Mynd 10. Broyting í aldursbólkunum 0-19 ár, í Føroyum og í Suðuroy, árini 1985-2007.**
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Eisini aldursbólkarnir frá 20-39 ár eru minkaðir nógv, við tilsamans 24,8% í árunum 1985 til 2007. Minkingin í talinum av kvinnum er tó munandi størri enn minkingin í talinum av monnum. Talið av kvinnum í aldursbólkinum 20-39 ár er minkað við 31,4%, meðan minkingin hjá monnum er 19,2%. Minkingin í Suðuroy er eisini í hesum aldursbólkinum væl størri enn í Føroyum sum heild.




**Mynd 11. Broyting í aldursbólkinum 20-39 ár, í Føroyum og í Suðuroy, árini 1985-2007.**
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Við øðrum orðum er talan um stóra minking í teimum yngstu aldursbólkunum. Og er orsøkin til hetta sum sagt, at tað í fyrsta lagi serliga eru ung fólk, sum eru flutt úr Suðuroy í árunum 1985 til 2007, og hartil eru lutfalsliga fá børn fødd í tíðarskeiðinum.

### 3.3.4. Stór minking í talinum av kvinnum í burðarførum aldri

Gongdin í fólkatalinum í Suðuroy seinastu áratíggjuni hevur ført við sær, at tað eru alsamt færri ung fólk og alsamt fleiri eldri fólk. Hetta hevur eisini stóra ávirkan á talið av kvinnum í burðarførum aldri, kvinnur sum eru millum 15 og 49 ár.




**Mynd 12. Broyting í talinum av kvinnum í aldursbólkinum 15-49 ár, 1985-2007, býtt á sýslur.**
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Við ársbyrjan 2007 vóru tað í Føroyum eins nógvar kvinnur í burðarførum aldri, sum tað var við ársbyrjan í 1985, men hetta er tó ikki støðan í øllum sýslum í landinum. Talið av kvinnum í burðarførum aldri í Suðuroy er minkað við 18,1% frá 1985 til 2007. Umframt eina minking í Suðuroy, so er minkingin í Sandoyar sýslu eisini heilt stór, har er minkingin 25,1%. Um bert verður hugt at árunum 2007 í mun til 1985, so er eisini talan um eina minking í Vága sýslu, men verður hugt at broytingini síðan ár 2000, so er talið av kvinnum í burðarførum aldri støðugt vaksið tey seinastu 5-6 árini. Í Norðoya sýslu er í árunum 1985 til 2007 talan um eina lítla minking í talinum av kvinnum í burðarførum aldri. Í Eysturoyar og Streymoyar sýslum er hinvegin talan um ein vøkstur.

*Vandamikil skeiv gongd*

Í árunum frá 1985 til 2007 er talið av kvinnum í Suðuroy, sum eru í burðarførum aldri minkað við umleið 10 kvinnum í miðal um árið, ein minking á tilsamans 221 kvinnur í tíðarskeiðinum. Tann stóra minkingin er tó farin fram í tíðarskeiðinum frá 1992 til 1995, tá talið av kvinnum í burðarførum aldri minkaði við umleið 100 – og í árunum frá 1995 til 2007 er eisini talan um eina minking á gott og væl 100.




**Mynd 13. Tal av kvinnum í Suðuroy í aldursbólkinum 15-49 ár, 1985-2007.**
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Um hendan gongdin heldur áfram, so er bara spurningur um tíð, áðrenn tað búgva færri enn 900 kvinnur í burðarførum aldri í Suðuroy. – Og við støði í miðal burðartølunum í Suðuroy tey seinastu 10 árini, so fáa 900 kvinnur í burðarførum aldri umleið 50 børn um árið. Við

øðrum orðum kann verandi gongd føra við sær, at tað innan eitt stutt áramál (5-10 ár) verða fødd í miðal 50 børn (ella færri) um árið í Suðuroy, t.v.s. 20 børn færri enn tað blivu í 2006, og heili 50 børn færri enn miðskeiðis í 1970árunum.

Og tá tað samstundis er sannlíkt, at deyðstíttleikin hækkar, merkir hetta, at talan verður um eitt árligt negativt burðaravlop á 25-50. Við øðrum orðum fer fólkatalið í Suðuroy at minka við 25-50 fólkum um árið – áðrenn til- og fráflyting úr og í oynna eru roknaðar við. Í tíðarskeiðinum frá 1985 til 2006 var árliga miðal nettofráflytingin úr Suðuroy umleið 50 fólk. Um hetta verður gongdin komandi árini eisini, so fer fólkatalið í Suðuroy í eitt tíðarskeið at minka við millum 75-100 fólkum um árið.

### 3.3.5. Lutfalsliga lágur føðitíttleiki

Broytingin í lutfallinum av kvinnum í burðarbúnum aldri hevur eisini ávirkan á føðitíttleikan, sum flest øll árini síðan 1985 hevur ligið lægri enn føðitíttleikin í Føroyum – undantakið er tó árið 2006.




**Mynd 14. Føðitíttleikin í Føroyum og í Suðuroy 1985-2006. Pr. 1.000 íbúgvar.**
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Fyri at samanbera føðitíttleikan í Suðuroy og í landinum sum heild, verður føðitíttleikin roknaður pr. 1.000 íbúgvar. Í 2006 var føðitíttleikin pr. 1.000 íbúgvar í Suðuroy 14,7 – t.v.s.

at fyri hvørjar 1.000 íbúgvar, sum búðu í Suðuroy í 2006 vórðu tað í 2006 fødd 14,7 børn. Í Føroyum sum heild vórðu tað fødd 13,7 børn pr. 1.000 íbúgvar.

Eins og víst í mynd 14 omanfyri, so hevur føðitíttleikin í Suðuroy tey seinastu nógvu árini verið væl lægri enn í landinum sum heild, undantakið er tó 2006 tá fleiri børn enn vanligt vórðu fødd í Suðuroy, spurningurin er so um 2006 var eitt óvanligt ár, ella um talan verður um eitt rák, at fleiri børn verða fødd í Suðuroy?

**Eisini lágur aldursbýttur føðitíttleiki**

Tá føðitíttleikin er roknaður í mun til, hvussu nógv børn kvinnur í burðarførum aldri fáa (aldursbýtti føðitíttleikin), er myndin eisini hin sama. Tey seinastu 15 árini hevur aldursbýtti føðitíttleikin í Suðuroy verið lægri enn í landinum sum heild.

## 3.3.6. Lutfalsliga høgur deyðstíttleiki

Eitt langt áramál við fráflyting hevur sum víst omanfyri havt stóra ávirkan á aldurs- og kynssamansetingina í Suðuroy. Hendan broyting hevur ført við sær, at talið av eldri fólk í Suðuroy er vaksið, og hetta talið er eisini lutfalsliga høgt, um samanborið verður við Føroyar sum heild. Eitt lutfalsliga høgt tal av eldri fólk ávirkar eisini deyðstíttleikan.




**Mynd 15. Deyðstíttleikin í Føroyum og í Suðuroy 1985-2006.**
*Kelda: Hagstova Føroya*

Deyðstíttleikin í Suðuroy hevur eisini í nógv ár ligið væl omanfyri deyðstíttleikan í Føroyum, sí eisini mynd 15 omanfyri.

# 4. Trupulleikin ikki nýggjur!

Teir trupulleikar – ella tær avbjóðingar – sum Suðuroyggin hevur at dragast við, hvat viðvíkur gongdini í fólkatalinum, eru als ikki nýggir. Trupulleikin hongur í stóran mun saman við búskaparligu gongdini í Suðuroy, har talan hevur verið um eina skiftandi gongd frá einum tíðarskeiði til annað, og hetta sæst eisini í gongdini í fólkatalinum. Mynd 16 niðanfyri, sum er yvir fólkatalsgongdina síðani 1801, gevur sum so eisini eina góða mynd av búskaparligu gongdini í Suðuroy.




**Mynd 16. Fólkatalið í Suðuroy 1801 - 2007.**
*Keldur: Landsfólkayvirlitið og Hagstova Føroya.*

Í seinnu helvt av 1800talinum byrjaði menningin av føroyska fiskivinnusamfelagnum av álvara. Við góðum firðum og stuttari leið til góð fiskimið høvdu Tvøroyri og Vágur nakrar náttúrugivnar fyrimunir. Hetta saman við dugnaligum entreprenørum førdi við sær, at Suðuroyggin gjørdist vinnuliga dynamoin í Føroyum og var tað í tíðarskeiðinum frá 1890unum fram til seinnu helvt av 1920unum.

Í hesum tíðarskeiði fluttu nógv fólk til Suðuroyar at arbeiða og settu fleiri teirra eisini búgv í oynni. Fólkatalið í Suðuroy vaks nógv hetta tíðarskeiðið og meira enn tvífaldaðist frá 1880 til

1916[4]. Tey trý áratíggjuni frá 1880 til 1922 vaks fólkatalið í Suðuroy við umleið 25% hvørt áratíggju. Í 1921 búðu 4.863 fólk í Suðuroy, svarandi til 22,8% av fólkinum í Føroyum tá.

Sum tíðirnar broyttust miðskeiðis í 1920árunum og við heimsfevnandi kreppu í 1930árunum, steðgaði stóri vøksturin í fólkatalinum í Suðuroy eisini. Árini frá 1925 til 1930 var gongdin í fólkatalinum í Suðuroy sambærilig við gongdina í Føroyum sum heild, men eftir hetta hevur vøksturin í fólkatalinum í Føroyum verið nakað hægri enn í Suðuroy. Hendan gongdin helt eisini áfram undir Seinna Heimsbardaga og tey fyrstu árini eftir kríggið.

Fólkatalið í Suðuroy toppaði í 1950, tá 6.268 fólk búðu í oynni. Suðuroyggin varð eisini rakt av búskaparkreppuni, sum var í Føroyum fyrst í 1950árunum, og fólkatalið í oynni minkaði øll árini fram til umleið 1970. Í tíðarskeiðinum frá 1950 til 1970 minkaði fólkatalið í Suðuroy við 11,4%. Í sama tíðarskeiði vaks fólkatalið í Føroyum við 25,0%.

Í fyrru helvt av 1970árunum vendi gongdin. Høvuðsorsøkin var økt virksemi innan fiskivinnuna, bæði á sjógvi og landi. Tvey nýggj flakavirkir vórðu bygd í Suðuroy í 1970árunum og fleiri nýggir trolarar komu eisini til oynna í hesum tíðarskeiði. Fólkatalið vaks eisini nakað fram til 1980, vøksturin var 6,4%. Í sama tíðarskeiði vaks fólkatalið í Føroyum við 12,5%.

Hóast búskaparliga gongdin í Føroyum (eisini í Suðuroy) var góð stóran part av 1980árunum, so minkaði fólkatalið í Suðuroy við 1,3% hetta áratíggju, samstundis sum fólkatalið í Føroyum vaks við 6,9%. Búskaparkreppan, sum byrjaði fyrst í 1990árunum, rakti Suðuroynna sera meint. Sunnara helvt í oynni varð serliga hart rakt av stórum arbeiðsloysi, men talan var tó um stóra fráflyting allastaðni úr oynni. Í árunum frá 1990 til 2000 minkaði fólkatalið í Suðuroy við 15,1%. Minkingin í Føroyum sum heild var í sama tíðarskeiði 5,1%.

Sum búskaparstøðan í Føroyum broyttist í seinnu helvt av 1990árunum, broyttist eisini gongdin í fólkatalinum, og í 1996/1997 byrjaði fólkatalið í Føroyum aftur at vaksa. Gongdin í fólkatalinum í Suðuroy broyttist tó ikki fyrr enn um aldaskiftið og fór at ganga rætta vegin í

[4] Á Tvøroyri var talan um nærum eina ferfalding av fólkatalinum, meðan fólkatalið í Vági trýfaldaðist í nevnda tíðarskeiði.

2001 og 2002 – hesi bæði árini vaks fólkatalið við 3,3%. Men eftir hetta er fólkatalið í Suðuroy aftur minkað – eisini hóast tíðirnar í Føroyum sum heild (eisini í Suðuroy) hava verið góðar. Í árunum 2003 til 2007 er fólkatalið í Suðuroy minkað við 3,6%. Í sama tíðarskeiði er fólkatalið í Føroyum vaksið við 1,4%.

Tað eru fleiri orsøkir til, at gongdin í fólkatalinum í Suðuroy tey seinastu áratíggjuni hevur verið verri enn gongdin í Føroyum sum heild. Ein av høvuðsorsøkunum er, at Suðuroyggin ikki í sama mun sum fyrr hevur megnað at fáa lut í vøkstrinum, sum hevur verið í samfelagnum. Broytingar í samfelagnum seinastu áratíggjuni hava m.a. ført við sær, at almenn fyrisiting, almennar tænastur og tænastur sum heild eru vorðnar vakstrarvinnurnar í landinum, meðan tær ófaklærdu vinnurnar (m.a. fiskivinnan á landi) ikki í sama mun sum áður eru í vøkstri. Ein týðandi broyting í hesum sambandi er eisini, at vakstrarvinnurnar eru farnar frá einamest at brúka ófaklærd fólk (hetta er og var galdandi fyri fiskivinnuna á landi) til at brúka útbúgvin fólk. Við moderniseringini av samfelagnum er sostatt eisini fylgd ein gongd ímóti einum hægri útbúgvingarstøði. Alsamt fleiri ung velja eisini at nema sær eina førleikagevandi útbúgving (miðallangar og langar útbúgvingar), hetta er sjálvsagt eisini galdandi fyri ung í Suðuroy. – Og tá tað serliga er í miðstaðarøkinum, at størv eru til útbúgvin fólk, so gerst leiðin aftur til Suðuroyar eftir lokna útbúgving oftani long. Hetta er eisini ein av orsøkunum til stóru fráflytingina av ungum fólkum tey seinastu áratíggjuni.

## 4.1. Toppaði fólkatalið í Suðuroy í 1921

Tá hugt verður eftir gongdini í fólkatalinum í Suðuroy yvir eitt langt áramál og samanberingar verða gjørdar við gongdina í fólkatalinum í Føroyum, so kunnu gerast nakrar daprar niðurstøður.

Roknað sum lutfall av fólkinum í Føroyum, so "toppaði" fólkatalið í Suðuroy í 1921, tá 22,8% av føroyingunum búðu í Suðuroy. Síðan hetta er fólkatalið í Suðuroy – roknað sum lutfall av fólkatalinum í Føroyum – minkað ár um ár. Við ársbyrjan 2007 búðu 10,2% av føroyingunum í Suðuroy.




**Mynd 17. Lutfalsligi parturin av fólkinum í Føroyum, sum búgva í Suðuroy, árini 1801 - 2007.**
*Keldur: Landsfólkayvirlitið og Hagstova Føroya.*

*Lægri vøkstur enn í Føroyum sum heild í fleiri enn 80 ár*

Tá gongdin í fólkatalinum í Suðuroy verður samanborin við gongdina í fólkatalinum í Føroyum, kann eisini staðfestast, at síðan 1921 hevur árligi vøksturin í fólkatalinum í Suðuroy (við undantak av tveimum árum) ongantíð verið á sama støði sum í Føroyum. við øðrum orðum er fólkatalið í Suðuroy, í lutfalli av fólkatalinum í Føroyum, minkað hvørt ár síðan 1921, við undantaki av tveimum árum. Undantakið er í 1992, tá fólkatalið í Suðuroy minkaði eins nógv og í Føroyum, hetta árið minkaði fólkatalið við 0,3%. Og í 2002 vaks fólkatalið í Suðuroy meira enn fólkatalið í Føroyum, tá vaks fólkatalið í Suðuroy við 2,2%, meðan vøksturin í Føroyum var 1,8%.

*Minking í fólkatalinum í 42 av teimum seinastu 56 árunum*

Ein onnur staðfesting, sum kann gerast, tá hugt verður eftir gongdini í fólkatalinum í eitt longri tíðarskeið er: Síðan 1950 hava tað bert í 14 ár verið talan um ein árligan vøkstur í fólkatalinum í Suðuroy. Við øðrum orðum hevur fólkatalið í Suðuroy verið fyri eini árligari minking í 42 av teimum seinastu 56 árunum.

## 5. Skeiv gongd í ein mansaldur

Tað seinastu tíðina – seinnu helvt av 2006 og fyrstu mánaðirnar av 2007 – hevur nógv fokus verið á, at tað sum heild gongur betur í Suðuroy. Tað er sjálvsagt eisini sera positivt, at tað er meira virksemi í landinum sum heild – eisini í Suðuroy. Í mun til støðuna á vári 2005, har arbeiðsloysið í Suðuroy var høgt, so er tað eisini at gleðast um, at tað í Suðuroy í dag (juni 2007) er at kalla onki arbeiðsloysi. Men hóast tað búskaparliga hevur gingið væl tað seinasta árið (2006 – 2007), um samanborið verður við undanfarin ár, so bøtir hetta tó ikki um tann veruleikan, at Suðuroyggin anno 2007 hevur álvarligar demografiskar trupulleikar.

Demografiskar broytingar henda spakuliga, hetta hevur (sum víst í hesum arbeiðsritinum) eisini verið støðan í Suðuroy, har gongdin í fólkatalinum og samansetingin í mun til aldur og kyn hevur gingið skeiva vegin í langa tíð. Við tað at broytingarnar henda spakuliga og yvir langa tíð, so verður ofta ikki gáað eftir demografisku broytingunum– og av somu orsøk verða trupulleikarnir oftani ikki tiknir upp, fyrr enn "skaðin er vorðin heilt stórur". Hetta er eisini støðan í Suðuroy í dag.

Vit hava í langa tíð vitað, at tað í demografiskum høpi hevur gingið skeiva vegin í Suðuroy, men trupulleikin hevur ikki verið tikin upp. Nú tað búskaparliga gongur betri enn undanfarin ár, hevur tað týdning, at arbeitt verður við ítøkiligum langtíðarloysnum. Teir bygnaðarligu skeivleikar, sum eru á demografiska økinum, taka langa tíð at broyta, og tá broytingar hava verið skeiva vegin í eitt langt áramál – eisini í góðum tíðum – er tað alneyðugt at arbeitt verður við loysnum, sum kunnu virka við til, at gongdin broytist.

Ein av niðurstøðunum í lýsingini "Vinnulívið í Suðuroy í 2006" (Holm og Mortensen, 2007) er, at Suðuroyggin, ikki í sama mun sum onnur øki í landinum hevur fingið lut í vøkstrinum, sum hevur verið seinastu árini. Lýsing í "Vinnulívið í Suðuroy í 2006" bendir eisini á, at vinnulívið í Suðuroy er veikt og hevur við óstøðugari inntjening eitt ivasamt grundarlag til at skapa neyðuga vøksturin í Suðuroy. Við hesum í huga og við demografisku trupulleikunum í huga, kann enn einaferð staðfestast, at alneyðugt er, at arbeitt verður við loysnum, sum kunnu verða við til at venda gongdin í fólkatalinum í Suðuroy.

Um onki verður gjørt, so er veruligur vandi fyri, at gongdin í fólkatalinum heldur fram skeiva vegin. Við minkingini í talinum av kvinnum í burðarførum aldri og við einum eftir øllum at døma hækkandi deyðstíttleika, so er tað væntandi, at innan eitt ávíst áramál (5-10 ár) verður árliga burðaravlopið í Suðuroy negativt við 25-50. Og við einum mynstri við fráflyting, sum í fleiri enn 20 ár hevur verið umleið 50 fólk í miðal um árið, so skulu stórar broytingar til, fyri at gongdin í fólkatalinum í Suðuroy skal byrja at ganga rætta vegin. Demografisku trupulleikarnir mugu takast í álvara, um ikki trupulleikarnir skulu gerast alsamt størri í komandi árum.

## Bókmentir og keldur

Holm, Dennis, og Bogi Mortensen, 2007. *Vinnulívið í Suðuroynni í 2006*. Arbeiðsrit 14/2007. Granskingardepilin fyri Økismenning 2006.

Hagstova Føroya (www.hagstova.fo)
Landsfólkayvirlitið.